## Todi fekk bert javnleik

Start spældi mánakvøldið á heimavølli ímóti aftasta liðnum í tippuliguni, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Start hevði munin í dystinum so at siga alla tíðna, og Marius Johnsen legði Start á odda eftir 35 minuttir, tá hann snittaði eitt frísparksinnlegg í málið. Í seinna hálvleiki eydnaðist tað Tromsø at javna við máli, sum Sigurd Rushfeldt skoraði. Todi Jónsson byrjaði dystin í álopinum, og hann spældi til 12 minuttir vóru eftir. Tá kom David Nielsen inn fyri hann. Todi var vandamikil, tá hann brúkti ferðina hjá sær, men skotini hjá honum góvu einki úrslit.



## Federer hevur beina kós

Roger Federer hevur fingið sannførandi byrjan í Wimbledon tenniskappingini, ið verður hildin í Onglandi í hesum døgum. Federer hevur spælt fýra dystir, og enn hevur hann ikki tapt eitt sett. Mánadagin vann Federer 3-0 ímóti Tomas Berdych, og sum Federer spælir í løtuni, er lítið at ivast í, at hann fer at vinna Wimbledon-kappingina. Federer hevur vunnið Wimbledon seinastu trý árini, og hann liggur ovast á heimsstyrkislistanum. Næsti dysturin hjá Federer er ímóti Mario Antic, sum er seinasti spælarin, ið hevur vunnið á Federer í dysti á grasi – tað var í 2002.

# EB/Streymur flongdi B68

*EB/Str.*

*B68*

**B68 vildi nógv fram eftir vøllinum, og tað revsaði EB/Streymur við at skora átta mál ímóti teimum. Flúgvandi felagsliðið fleyg við stórsigrinum á B68 upp aftur á tindin í Formuladeildini**

EB/STREYMUR-B68
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Heili 10 mál vóru skotin, tá ið EB/Streymur og B68 spældu á Mølini mánakvøldið. Dysturin var fluttur frá sunnudegnum orsaka av dómaratroti, og tá ið dysturin nú varð spældur, var hvørki dómaratrot ella máltrot at hóma.

Longu innanfyri góðar 20 minuttir høvdu bæði liðini skorað tvær ferðir í part, og so var rættiliga lagt upp til eina málveitslu.

B68 fylgdi væl við fyrstu løtuna, men sum dysturin leið, var tað EB/Streymur sum setti seg á dystin, og tá B68 framvegis vildi nógv fram eftir vøllinum, var tað lag á manni hjá kontrasterka EB/Streymi at renna B68-liðið av og skora mál – næstan á samlibandi.

### Góðar treytir hjá EB/Streymi

Tað vóru slakir tveir minuttir spældir, tá ið EB/Streymur legði seg á odda. Arnbjørn Hansen, sum var ein av fremstu monnunum hjá EB/Streymi gjørdi fyrsta málið, men tað var ikki tað seinasta.

Tá ið eitt gott korter var farið, fekk B68 brotsspark, tá ið Súni Fríð Barbá varð feldur í brotsteignum. Verjuspælarin Ovi Magnussen sendi brotssparkið í málið til 1-1.

Arnbjørn Hansen var aftur á rætta staðnum í 23. minutti, men Súni Fríði Barbá, sum var klárt besti B68-spælarin í dystinum, javnaði við einum sera góðum skoti.



*B68 vildi ikki grava seg niður í dystinum ímóti toppliðnum í Formuladeildini. Tað gav EB/Streymi møguleikan at spæla sítt eyðkenda álopsspæl, og átta ferðir skoraði toppliðið hjá botnliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Og so var tað, at EB/Streymur veruliga setti seg á dystin, og nú kláraði B68 ikki at fylgja við meira. Toftamenn vóru komnir til Eiðis at bjóða EB/Streymi av, og B68 vildi gjarna spæla frameftir vøllinum. Tað hevði tó við sær, at EB/Streymur fekk gott pláss í álopsstøðu, og er tað nakað, ið EB/Streymur dugir væl, so er tað at revsa lið, sum leypa á og kanska gera mistøk.

Longu áðrenn hálvleiksteðgin hevði EB/Streymur skorað fýra mál afturat.

Hans Pauli Samulsen legði EB/Streym fram um 3-2 við einum góðum frísparksmáli, og løtu seinni beindi Egil á Bø eitt hornaspark í málið. Arnbjørn Hansen økti til 5-2 tveir minuttir fyri hálvleiki, og beint áðrenn steðgin økti Rafael Kwiecinski til 6-2.

### Tvey mál afturat

Í seinna hálvleiki var tað framvegis EB/Streymur, ið sat á dystinum, og heimaliðið skoraði tvey mál afturat.

Fyrst var tað álopsspælarin Sorin Anghel, sum slapp upp í part, tá ið hann sendi eitt brotsspark í málið til 7-2, og so var tað Hans Pauli Samuelsen, sum slapp at seta punktum, tá ið hann kom ímillum eina afturlegging til B68-málmannin og skoraði til 8-2.

Við hesum lemjandi stórsigri reyk EB/Streymur fram í toppin í Formuladeildini aftur, og málmunurin var nógv betraður. B68 fekk ein dyggan frammaná, og tað var langt frá besta avrikið og úrslitið at taka við sær í viðføri til týðandi botndystin ímóti ÍF um vikuskiftið.

– Vit gjørdu sera nógv mistøk í hesum dystinum, og tað dugdi EB/Streymur at revsa. Vit vóru ikki komnir til Eiðis fyri at grava okkum niður, men vit høvdu ein sera ringan dag, sigur Súni Fríði Barbá, álopsspælari hjá B68.

Venjarin hjá EB/Streymi var hinvegin sera fegin um stórsigurin á B68.

– Vit fingu góðar umstøður til at spæla, tí B68 royndi at spæla offensivt, og so kundu vit veruliga spæla okkara spæl ímóti teimum. Kanska skuldu teir havt lagt størri dent á verjupartin, sigur Piotr Krakowski.

### FAKTA

**EB/Streymur-B68 8-2 (6-2)**

**1-0:** Arnbjørn Hansen, 2.
**1-1:** Ovi Magnussen, br., 16.
**2-1:** Arnbjørn Hansen, 23.
**2-2:** Súni Fríði Barbá, 25.
**3-2:** Hans Pauli Samuelsen, 30.
**4-2:** Egil á Bø, 38.
**5-2:** Arnbjørn Hansen, 43.
**6-2:** Rafael Kwiecinzki, 45.
**7-2:** Sorin Anghel, br., 55.
**8-2:** Hans Pauli Samuelsen, 73.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert Hansen, Marni Djurhuus, Egil á Bø (Fróði Clementsen, 58.), John Heri Dam – Ronnie Samuelsen (Knút Vesturtún, 64), Bárður Olsen – Arnbjørn Hansen (Esmar Eiðisgarð, 68), Hans Pauli Samuelsen, Rafael Kwiecnizki – Sorin Anghel
**Gult kort:** Eingin
**B68:** Tórður Thomsen – Jóan Petur Poulsen, Kári Hansen (Magnus Jakobsen, 81.), Ovi Magnussen, Arnbjørn Danielsen – Alex Troleis, Jann Ingi Petersen, Julian Johnsson, Kristian Anton Andreasen (Óli Olsen, 62.) – Súni Fríði Barbá, Jóan Dávur Højgaard (Emil Olsen, 85.)
**Gul kort:** Ovi Magnussen, Kristian Anton Andreasen, Julian Johnsson, Jann Ingi Peterseno

## B68 skal fóta sær

Eftir stórtapið á Eiði verður uppgávan hjá B68 nú at fóta sær til týðandi botndystin ímóti ÍF næsta mánakvøld.

Álopsspælarin hjá B68, Súni Fríði Johannesen, heldur, at tað nyttar einki at hugsa ov nógv um dystin á Eiði.

– Hetta tapið gevur sjálvandi høvi til rannsakan á liðnum, men vit mugu ikki gloyma, at næsti dysturin er sera týdningarmikil. Vit mugu leggja dystin á Eiði aftur um okkum og royna at manna okkum upp til dystin ímóti ÍF, sigur Súni Fríði.

Hann heldur, at tað er mentalt krevjandi fyri spælararnar, tá ið tað gongur illa.

– Spælið og avrikið hjá okkum er eitt sindur merkt av, at tað hevur gingið illa í fleiri dystum. Mótgongdin ávirkar liðið, men vit hava einki annað val, enn at arbeiða okkum burtur úr hesi truplu støðuni, sigur Súni Fríði Barbá.

**formuladeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 15 | 9 | - | 4 | - | 2 | 38 | 18 | 20 | 31 |
| 2 B36 | 15 | 8 | - | 5 | - | 2 | 27 | 14 | 13 | 29 |
| 3 GÍ | 16 | 7 | - | 7 | - | 2 | 23 | 16 | 7 | 28 |
| 4 KÍ | 16 | 6 | - | 8 | - | 2 | 34 | 19 | 15 | 26 |
| 5 NSÍ | 15 | 7 | - | 5 | - | 3 | 29 | 18 | 11 | 26 |
| 6 HB | 15 | 7 | - | 4 | - | 4 | 33 | 26 | 7 | 25 |
| 7 Skála | 15 | 3 | - | 4 | - | 8 | 15 | 17 | -2 | 13 |
| 8 VB/S | 15 | 3 | - | 2 | - | 10 | 15 | 47 | -32 | 11 |
| 9 B68 | 15 | 2 | - | 3 | - | 10 | 14 | 31 | -17 | 9 |
| 10 ÍF | 15 | 2 | - | 2 | - | 11 | 15 | 37 | -22 | 8 |